# Ein heiður ið fløvar

**Tað gjørdist Ragnar Joensen, stjóri á Marine Harvest Faroes, ið gjørdist Ársins privati leiðari 2011, sum Synergi skipar fyri á hvørjum ári**

Leo Poulsen

»Viðkomandi hevur við kønari hond skapt fíggjarlig og lívfrøðilig burðardygg úrslit. Hann hevur verið sjónligur bæði sum stjóri og sum leiðari fyri vinnufelag og hansara positiva lyndi og tænastusinnaði hugburður á starvsleið eiga at geva øðrum framsóknum leiðarum íblástur«.

Soleiðis ljóðaði grundgevingin hjá dómsnevndini fyri at velja Ragnar Joensen til Ársins privata leiðara 2011.

– Hetta var ein ógvuliga fløvandi heiður, og eg vil takka teimum, sum hava innstillað meg og sum hava valt meg, segði Ragnar Joensen.

Hann segði, at hetta hevur verið ein hektisk tíð beint nú, hann er í ferð við at flyta yvir til Noregs.

– Tað hevur verið stuttligt at verið partur av einari vinnu, sum hevur gingið so væl í seinastuni. Marknaðurin hevur verið góður, men vit hava eisini gjørt eina rúgvu av tiltøkum sum ger, at framleiðslan er góð, segði Ragnar Joensen.

Hann vísti á, at tað hevur ikki altíð gingið so væl í alivinnuni.

– Fyri nøkrum árum síðani sá tað rættiliga svart út í vinnuni, og tá skuldi ein rúgva at tungum tøkum takast, og tað gjørdu nógv fólk í vinnuni og hjá myndugleikunum, og tað munnu vera fleiri, sum tá høvdu uppiborið at fingið eitt herðaklapp, segði Ragnar Joensen.

Hann helt tað hava verið lætt, at verið leiðari á Marine Harvest, tí fyritøkan hevur so nógv góð starvsfólk.

– Tey hava hjálpt mær nógv í mínum leiðarastarvi, og tað var ein sum segði við meg, at eg hevði timað tað rættiliga væl, tí nú stingi eg av meðan tað gongur so væl, segði Ragnar Joensen.

Hann vónaði at tað framvegis fer at ganga væl í alivinnuni.

– Vinnan er í hvussu er klár at taka nøkur tøk, segði Ragnar Joensen, Ársins privati leiðari 2011.



*Ragnar Joensen, stjóri á Marine Harvest Faroes, gjørdist Ársins privati leiðari í kapping við Janus Petersen, forstjóra í BankNordik, og Regin Jacobsen, stjóra á Bakkafrost*

Mynd: Jens Kristian Vang




*Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn og Ársins almenni leiðari 2011 saman við Anniku Andreasen frá Synergi*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# At røkka settum málum er høvuðsavbjóðingin

**Tað gjørdist Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, sum fekk heiðurin Ársins almenni leiðari 2011. Og hann sigur, at høvuðsavbjóðingin hjá einum leiðara er at røkka settum málum**

Leo Poulsen

»Viðkomandi hevur sýnt stórt virkisfýsni og áræði við fokus á trivnaðin hjá fólki. Hann hevur verið sjónligur sum leiðari hjá starvsfólki og borgarar. Hansara arbeiðssemi og tænastusinnaði hugburður átti at givið øðrum leiðarum íblástur«.

Segði dómsnevndin í grundgeving síni at velja Heðin Mortensen til Ársins almenna leiðara 2011.

– Tað er mær ein stórur heiður at taka ímóti hesi innstillingini her í dag. Fyrst og fremst vil eg takka teimum ið hava hildið meg verdan til hendan heiður, og eisini vil eg takka dómsnevndini fyri teirra niðurstøðu, segði Heðin Mortensen.

Hann takkaði eisini teimum dugnaligu og heilhugaðu starvsfólkunum hjá Tórshavnar kommunu.

– Tey og teirra dygdir eiga sera stóran leiklut í hesum heiðrinum, segði Heðin Mortensen.

Hann segði, at hann ikki hevur sæð innstillingina og tí ikki veit hvat hevur gjørt hann verdan til henda heiður.

– Men vit vita, at søgan er full av stórmennum, sum eru mettir sum góðir leiðarar, tí teir dugdu so væl at fáa fólkið við sær. Men ofta megnaðu hesir ikki at røkka málunum, teir settu sær, og at røkka settum málum er høvuðsavbjóðingin hjá einum leiðara, segði Heðin Mortensen.

Hann segði, at tað er umráðandi og motiverandi at fáa fólk við sær, men ikki eitt mál í sær sjálvum.

### Tora at taka møguleikan

– Tað er neyðugt at hava eina visjón, men tað snýr seg eisini um at vera opin í gerandisdegnum, at síggja, at lurta og at taka ímóti góðum ráðum frá teimum, sum hava vitanina og royndirnar, segði Heðin Mortensen.

Tí brúkar hann eisini nógva tíð at tosa við fólk fyri at fáa hylling á, hvat er gott fyri trivnaðin hjá borgarunum.

– Hetta fyri at skapa ein bý, eitt samfelag, sum fólk trívast í og tíma at búgva í, segði borgarstjórin.

Hann segði eisini, at hann egði dent á at vitja stovnar og arbeiðspláss fyri at hoyra tey, sum vit samskifta við í gerandisdegnum.

– Skulu vit flyta okkum ræður tað um ikki at stara okkum blind upp á forðingarnar, teimum vil tað altíð vera nokk av, og tí er eingin orsøk at brúka meira krút upp á tær, segði Heðin Mortensen.

Tað snýr seg hinvegin um at tora at taka møguleikan.

- At tora at ganga á odda, eisini í mótgangi. Sum politikari kann man bara gera tað við at leggja til brots og skapa forstáilsi fyri, hví tað er júst nú, at vit skulu taka hendan møguleikan, sdegði Heðin Mortensen.

Hann segði, at sum leiðari er tað av serstakliga stórum týdningi, at hava starvsfólkini við sær, at kunna líta á gteirra loyalitet of teirra fakleika.

– Tað, sum vit sum leiðarar skulu gera, er at vera trúgvir móti okkara sannføring og at tora at halda fast, tá á stendur, segði Heðin Mortensen, Ársins almenni leiðari 2011.